## Bárður um tónleik

Eg havi einki forhold til tónleik. Tann tónleikur, sum eg lurti eftir, hoyri eg í útvarpinum, tá ið eg koyri bil. Eg havi ongantíð spælt nakað ljóðføri, og eg havi heldur ongantíð havt nakran ávísan yndisbólk ella sangara.



## Bárður um fótbólt

Eg havi spælt fótbólt við Æsir og breyt einaferð beinið. Eg havi áhuga fyri allari líðítrótt og fylgi eisini við føroyskum og útlendskum fótbólti. Eg eri nokk so neutralur áskoðari, men eg eri imponeraður av liðum, sum klára at halda seg á toppinum ár eftir ár í hørðum kappingum uttanlands.

# at skeldast



*– Alt ov nógv tíð í føroyskum politikki verður brúkt til lokalpolitikk heldur enn at loysa landspolitisk mál. Løgtingið spillir sína tíð til lokalpolitikk, og summir løgtingsmenn gera tað meira enn aðrir, sigur Bárður Nielsen, sum nú er fyrrverandi politikari. Mynd: Jens Kr. Vang*

ikki heima í løgtinginum, hann hoyrir heima í kommunustýrunum. Løgtingið spillir sína tíð til lokalpolitikk, og summir løgtingsmenn gera tað meira enn aðrir, sigur Bárður Nielsen.

### Úr øskuni í eldin

Eftir at Bárður Nielsen hevði verið løgtingsmaður í tvey ár, fekk hann tilboðið um at gerast landsstýrismaður við fíggjarmálum. Tann tá 31 ára gamli vestmenningurin tók av.

– Eg umhugsaði tað sera gjølla, men eg kom til ta niðurstøðu, at tá ið tú fært ein slíkan kjans, mást tú taka av, tí tað er ikki vist, at tú fært kjansin aftur. Hóast lopið frá at verða løgtingsmaður til at gerast landsstýrismaður er sera stórt, so angri eg ikki, at eg gjørdi tað.

– Mær dámar væl at taka stórar avbjóðingar á meg, og eg havi altíð verið eitt kappingarmenniskja. Eg havi eina trúgv upp á tingini, og eingin avbjóðing er ov stór til at fara í holt við, sigur Bárður Nielsen, sum setti seg á landskassan á ungum aldri.

– Eg merkti einki til, at fólk ikki tóku meg fyri fult, tí eg var so ungur. Eg haldi, at míni sjónarmið eru komin væl fram, og eg havi faktiskt stórtrivist í politikki hesi árini.

### Heldur diplomati enn skeld

Bárður Nielsen hevur í almenna rúminum staðið fram við einum róligum – við hvørt næstan seigum – tóna, og tað er ikki misvísandi fyri hansara stíl sum politikari.

– Onkuntíð hevur tað gingið heitt fyri seg, og eg havi verið upp á kamp við onkran politikara um okkurt, men eg eri ikki ein, sum gongur runt og rópar eftir fólki. Eg royni altíð at verða diplomatiskur, tí eg haldi, at tað røkkur longur.

– Tað nyttar einki at ganga og skeldast við fólk, tú fært meira burtur úr at arbeiða konstruktivt, sigur Bárður Nielsen.

*Ber tað til at fáa vinfólk í politikki?*

– Eg havi heilt tilvitað roynt ikki at knýta meg ov tætt at nøkrum ávísum politikara, tí tað kann hava við sær, at tú styggir aðrar politikarar frá tær. Eg havi roynt at verið opin móti øllum politikarum, og eg havi ráðført meg við politikarar úr ymsum flokkum.

*Hvat er prísurin fyri at verða landsstýrismaður?*

– Arbeiðstrýstið er sera stórt, og tú hevur ongantíð – og tá meini eg ongantíð – frí. Tað leikar allatíðina so nógv á, at sjálvt tá ið tú ert heima, fært tú ikki sligið høvdið frá. Tað gongur sjálvandi út yvir tey nærmastu. Eitt er, at eg havi verið nógv burtur heimanífrá, men tað er enn verri, tá ið eg eri heima og alíkavæl ikki fái hildið frí og brúkt tíðina saman við konuni og børnunum. Eg ivist í, um tað nýggja arbeiðið hjá mær fer at bøta um hetta.